## Kirkjan á Kirkju 75 ár

28. mai eru 75 ár liðin, síðan kirkjan á Kirkju varð vígd. Dagurin verður hildin sunnudagin 1. juni. Á middegi verður hátíðargudstænasta, har biskupur prædikar. Seinnapartin kl. 17 verður gudstænasta við altargangi og tá prædikar dómpróstur. Eftir gudstænastuna á middegi bjóðar kirkjuráðið máltíð í lærarahúsunum, har øll eru vælkomin. Heldur sama veðrið sær, vera góðir møguleikar hjá fólki at sleppa út til Fugloyar henda dagin. Og kirkjufólkið á Kirkju bjóðar gestum hjartaliga vælkomnum at vera við at hátíðarhalda henda merkisdag.



## Bíligar ferðir til Reykjavíkar

Frá 2. juni til 24. oktober ber til at flúgva einvegis til Reykjavíkar fyri einans 995 kr. Ferðaseðlarnir verða seldar frá 26. mai til 31. mai á www.atlantic.fo, sigur Atlantsflog í tíðindaskrivi og vísir á, at Ísland altíð er ein bergtakandi uppliving. Náttúran er heimskend fyri sínar glóðheitu keldur og ísakøldu jøklar.. Í Reykjavík merkist væl, at býurin liggur mitt í millum Evropa og Amerika. Matstovurnar og kaféirnar eru fjølbroyttar, og mentanarlívið er ríkt. Tú kanst uppliva bæði opera, rokk og sjónleik á høgum stigi. Eisini kanst tú vitja Kringluna, Tjóðleikhúsið, Hallgrímskirkjuna, Norðurlandahúsið, Perluna og ein íslendskan djóragarð við íslendskum djórum

# Tjaldursreiður vekir ans

**Nakað síðani kundu vit fortelja, at eitt tjaldur hevði bygt sær reiður beint uttanfyri Clinton svituna í Hotel Føroyum. Leygarmorgunin komu ungarnir út, og tað hevur vakt miklan ans bæði heima og úti í stóru verð**

FUGLALÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Heilt nógv fólk eygleiða tjaldurshúskið á flagtekjuni á Hotel Føroyum. Her sæst annar av teimum vaksnu fuglunum saman við tveimum av ungunum*

Tá ið náttarvørðurin á Hotel Føroyum tíðliga leygarmorgunin fór at vita, hvussu stóð til við sjáldsamasta gesti á Hotel Føroyum í longri tíð, gjørdi hann stór eygu.

Herfyri vistu vit at fortelja, at eitt tjalduspar hevði bygt sær reiður bent uttanfyri vindeyga í Clinton svituni á Hotel Føroyum.

Leiðslan á Hotel Føroyum gjørdi beinanvegin av at seta vevmyndatól upp, so at allur heimurin kundi eygleiða tjaldursreiðrið og síðani er hetta tjaldursparið blivið millum teir sermerktastu gestirnar á hotellinum.

Og leygarmorgunin vórðu so øll trý eggini klakt og ungarnir komu út.

Á Hotel Føroyum siga tey, at øgiliga nógv fólk hava síðani gjørt vart við seg og fortalt, at tey hava eygleitt hetta lítla tjaldurshúski í vevmyndatólinum, sum tekur eina nýggja mynd fimta hvørt sekund.

Í hesum sambandi hava tey fingið teldurbrøv bæði úr Týsklandi, Noregi og Danmark, umframt úr Føroyum frá fuglavinum og øðrum áhugaðum.

Nú vóna tey bara, at rovfuglarnir ikki fáa eyga á teir tríggjar ungarnar, sum síðani hava hugnað sær á flagtekjuni uttan fyri reiðrið undir neyvum eftirlitið av teimum gomlu.

Vinstrumegin her á Portalinum ber til at klikkja seg beinleiðis inn á vevmyndatólið at eygleiða tjaldurshúskið.

## Hittast til gamans og álvara í Mykinesi

**Útoyggjastevnan í ár verður í Mykinesi um eina mánað. Har verður ymiskt á skránni fyri bæði børn og vaksin, og nú skulu tey eisini royna at vinna ferðasteypið í togtogan aftur frá fugloyingum**

ÚTOYGGJASTEVNA
*Áki Betrtholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er nú greitt, at í ár verður útoyggjastevnan í Mykinesi tann 28. juni.

Útoyggjafelagið sigur, at fyrireikingarnar ganga væl og nú verður arbeitt við góðum treysti við at gera alt klárt til at taka ímóti gestum.

Felagið sigur, at størsta avbjóðingin verður kanska samferðslan til og frá og tá ið talan er um so avbyrgda oyggj, er veðrið sjálvsagt sera avgerandi.

Skráin er fjølbroytt og tað er okkurt á skránni fyri bæði børn og vaksin og tað eisini bæði til gamans og álvara.

Á stevnuni verður sjálvandi aðalfundurin hjá Útoyggjafelagnum, men av øðrum tiltøkum kunnu nevnast, at listaframsýning verður í kirkjuni og tey fara at vísa gamlar filmar úr Mykinesi.

Annars verður bæði ríðing, traktortúrar fyri børn, tombola, bingo og ymisk spøl, og tað verða eisini fyriskipaðir túrar runt í bygdini, Ein túrur eftir fornum leiðum og ein listarligur túrur.

Jens Kjeld Jensen úr Nólsoy fer at halda fyrilestur og kjak um fuglaveiði í Mykinesi og annars verður útimøti, fólkafundur og sangur á skránni. Og alt endar við føroyskum og enskum dansi um kvøldið.

Ein kapping er eisini á skránni og tað er afturvendandi togtoganin ímillum útoyggjarnar og her skulu tey royna at vinna ferðasteypið aftur frá fugloyingum, sum vunnu tað í fjør.

Og sjálvandi fara tey eisini at selja mat, so at ongum nýtist at ganga svangur. Tað verður bæði heitur matur, smurt breyð og grillmatur at fáa.

Inntøkurnar av tiltakinum skulu brúkast til vøll og spæliplláss í bygdini.

# Hava fingið nýtt tak yvir høvdið

**Sjóvinnudepilin flutti fríggjadagin í nýggj høli. Tað gevur teimum møguleika at víðka um virksemið, og nú ætla teir sær eisini út í heim**

TRYGD Á SJÓNUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Lassi Borðoy, stjóri í Sjóvinnudeplinum, í skjúrtu og slipsi, sigur, at teir hava 22 ymisk skeið, serliga í trygd umborð á skipum. Teir hava eisini nýggja bjargingarbátastøð í henni eru tríggir bjargingaqrbátar og tríggir davidar*

Fríggjadagin var hátíðardagur á Vestaru Bryggju í Havn.

Sjóvinnudepilin, sum varð stovnaður í 2006, flutti fríggjadagin í nýggj høli á fjórðu hædd í bygninginum hjá Saltsøluni.

Í nýggju hølunum eru fleiri undirvísingarhøli, matarhøli, og skrivstovu. Í alt er talan um einar 350 fermetrar

Sjóvinnudepilin, kann bjóða 22 ymisk skeið, tey flestu í trygd umborð á skipum og skeiðini geva øll prógv. Harumframt eru eisini onnur skeið á skránni.

Í løtuni starvast seks mans hjá felagnum og teir eru allir gamlir sjómansskúlalærarar, og haraftrat eru tveir sjúkrarøktarfrøðingar knýttir at felagnum.

Lassi Borðoy, sum er stjóri í felagnum, hevur eisini góða barlast við sær sum stjóri í Atlantic Supply Base í trý ár.

Ætlanin er nú at stíga út í heim við virkseminum og ætlanin er at hava tríggjar mans úti nakrar mánaðir, meðan hinir tríggir arbeiða heima, og so skifta teir um.

Sjóvinnudepilin hevur longu hildið skeið umborð á Strandferðsluskipunum og Norrönu, umframt nøkrum fiskiskipum.

Samstundis sum depilin flytir í nýggj høli, taka teir eisini eina bjargingabátastøð í brúk, hon liggur úti á nýggju keiini á Viðarnesi. Bjargingabátastøðin umfatar tríggjar bjargingabátar og tríggjar davidar.

Eini báturin er innilokaður, og er einasti av sínum slag til venjingar í Føroyum.

Vit fara at fáa fleiri undirvísingarhølir, kantinu og sjálvandi skrivstovu. Í alt er talan um einar 350 fermetrar, sigur Lassi Borðoy.

Hann heldur, at tørvur er á einari slíkari fyritøku, sum Sjóvinnudeplinum. Eini 25% av allari manningini umborð á skipunum hjá Mærsk eru føroyingar, og í øllum danska farmaflotanum eru eini 15-20% av manningunum føroyingar, vísir Lassi Borðoy á.

Hann er tí spentur upp á, hvussu hendan fyrsta royndin at sleppa inn á útlendskar marknaðir fer at hepnast.

- Stóru reiðaríini eru varin at binda seg til smáar fyritøkur, og tí vilja tær fyrst royna seg fram. Men tað er eyðsæð, at fáa vit eitt stórt reiðarí sum kunda, verður skjótt brúk fyri fleiri starvsfólkum, segði Lassi Borðoy við Sosialin í farnu viku.

Um so verður, væntar hann ikki tað fer at gerast trupult at fáa fólk, serliga við kombineraðu skipanini, har fólk er úti eina tíð og so heima eina tíð.

- Serliga útisiglarar hava hug at fáa eitt slíkt starv, heldur Lassi Borðoy.